# Statoil startskot til seismikk

**Ikki færri enn trý vælútgjørd skip fara at gera kanningar fyri Statoil á føroyska landgrunninum í summar. Tað fyrsta kom á Havnina fríggjadagin og fer nú undir at skjóta seismikk í loyvunum hjá Statoil.**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Fríggjadagin kom fyrsta seismikkskipið í ár á Havnina eftir útgerð. Talan er um norska Polar Princess frá felagnum Fugro, sum er ein gamlan kenningur á landgrunninum. Við hesum stóra seismikkskipinum letur Statoil startskotið av til eina røð av kanningum á landgrunninum. Kanningar, sum skulu hjálpa felagnum at finna best egnaðu støðini í undirgrundini at seta sínar borikrúnur í, í 2006 og helst árini eftir tað eisini. Seinni koma tvey onnur skip at gera kanningar fyri Statoil. Tey koma at gera kanningar á økinum, sum Statoil fekk tillutað í 2. útbjóðing tann 17. januar í ár. So ein kann ikki siga annað enn at tað gongur skjótt og sigur tað helst eisini nakað um vónirnar hjá Statoil at finna olju og gass við Føroyar.

Polar Princess fer at skjóta seismikk á einum stóru øki, sum Statoil søkti um og fekk tillutað leitiloyvi. Rúni Hansen, stjori í Statoil, sigur, at endamálið við hesum kanningunum er at fáa eina betri fatan av jarðfrøðini í undirgrundini. Hini bæði skipini, sum koma til Føroya í næstum, fara at gera aðrar kanningar. Tað eina skal taka nakrar kjarnuroyndir av havbotninum, til tess at kanna, um kolvetni er likið upp úr undirgrundini og triðja skipið skal standa fyri kanningum, ið hava til endamáls at greina meira, hvussu tjúkt basaltið er á økinum.

Hini bæði skipini, sum eisini hoyra til felagið Fugro, eru Polarsyssel og Aurelia. Polarsyssel kemur seinast í mai og Aurelia seinni í juni. Tað er Thor í Hósvík, sum umboðar skipini í Føroyum. Thor hevur eisini fleiri hjálparskip í arbeiði í seismikkvinnuni og oljuvinnuni ymsa staðni kring heimin.

Statoil er tað útlendska oljufelagið, sum fekk tillutað flestu loyvini í 2. útbjóðing fyrr í ár. Felagið stendur einsamalt fyri nøkur av loyvunum og er so eisini saman við øðrum oljufeløgum.



*Gunnbjørn Mortensen hjá Thor, sum er umboð fyri Fugro*




*Polar Princess fer nú at skjóta Seismikk fyri Statoil á føroyska landgrunninum*